# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Nú kunnu palestinar fáa teir pengarnar, sum teir eiga til góðar. Vit vildu ikki lata Hamas fáa teir*

*(Ehud Olmert)*

# Næstan 10 mió flóttafólk

**Seinasta árið eru flóttafólkini í heimkinum vorðin eina millión fleiri í tali, og Irak-kríggið er orsøkin**



*Úr einari flóttafólkalegu í Norðurirak. Hendan legan er bara hálvt annað ár gomul, men kring heimin eru fólk, sum hava búð í flóttafólkalegum í meiri enn 30 ár*

Fyri fyrstu ferð í fimm ár veksur flóttafólkatalið í heiminum, og um ársskiftið vóru flóttafólkini 9,9 mió. í tali. Tað var 1,2 mió. fleiri enn eitt ár frammanundan, og tað talið svarar júst til tey iraksku flóttafólkini, sum í fjør flýddu til grannalondini Jordan og Sýrialand. Herumframt flýddu 300.000 aðrir irakar til onnur lond í fjør, og so nógv fólk eru ikki flýdd úr Irak eftir einum ári fyrr.

Flóttafólkadeildin hjá ST, UNHCR, sigur í sínari seinastu frágreiðing, at hóast flóttafólkatalið í Irak vaks nógv í fjør, er Afghanistan framvegis tað landið, sum hevur flest flóttafólk uttan fyri sítt egna mark. Hildið verður, at umleið 2,1 mió. afghanar eru flýddir av landinum, teir flestu til Pakistan.

Onnur lond, haðani nógv fólk eru flýdd, eru Sudan, Somalia, Kongo og Burundi, og sambært UNHCR eru næstan tvær mió. fólk flýdd úr hesum londunum.

ST metir ikki palestinararnar, sum búgva í Jordan, Libanon, Sýrialandi og teimum palestinsku økjunum, sum flóttafólk, tí teir hoyra undir stovnin UNRWA, sum tekur sær sær palestinskum flóttafólki burturav.

ST-frágreiðingin vísir týðiliga, at nógv tann størsti trupulleikin eru tey, sum eru flóttafólk í egnum landi. Hildið verður, at seinasta ársskiftið vóru 24,5 mió. fólk flóttafólk í egnum landi, og tað er heili 50 prosent meiri enn bara eitt ár frammanundan, sigur ST. Formliga verða hesi ikki roknað sum flóttafólk, so leingi tey eru í egnum landi.

# Brynja seg móti sjórænarum

**Donsk reiðarí hava bundið seg til at bøta um trygdina umborð á skipunum**



*„Danica White“ var á veg til Kenya, tá somaliskir sjórænarar rændu tað*

Fýra ella fimm ferðir um árið eru donsk handilsskip fyri álopum frá sjórænarum, men „Danica White“, sum varð álopið úti fyri somalisku strondini herfyri, er fyrsta danska handilsskipið, sum er rænt.

Tilburðurin hevur fingið fakfelagið Søfartens Ledere til at krevja tryggari umstøður umborð á skipunum, og nú hevur reiðarafelagið bundið seg til at eftirlíka kravinum. Per Gravgaard Hansen, sum er fakligur skrivari hjá Søfartens Ledere, sigur við blaðið 24 Timer, at tað er eitt sindur ymiskt, hvat tey einstøku reiðaríini ætla sær at gera.

- Okkara limir hava ongan áhuga í at ganga í skottryggum vesti ella við byrsu. Men tað ber til at fáa sær nútímans ávaringarskipanir og forðingar á lúnningina, sigur skrivarin. Eisini í reiðarafelagnum eru tey væl nøgd við nýggju avtaluna við yvirmenninar, sigur varastjórin í felagnum, Jan Fritz Hansen, við 24 Timer.

Sambært The International Maritime Bureau eru sjórænaraálopini fækkað tey seinastu árini. Í 2004 vórðu 329 skip álopin, í 2005 var talið 276, og í fjør kom tað niður á 249.

## STUTT SAGT

### Kent skip verður hotell

Bretska reiðaríið Cunard Line boðaði í gjár frá, at ferðamannaskipið „Queen Elizabeth 2“ verður lagt næsta ár eftir at hava siglt kring tað mesta av heiminum síðani 1967. Samstundis varð fráboðað, at eitt felag í Dubai hevur keypt skipið fyri 558 mió. krónur. Teir nýggju eigararnir ætla at umbyggja skipið til eitt flótandi marglætishotell og handilshús, og tað skal liggja við eftirgjørdu oynna Palm Jumeirah í Persiska Flógvanum. Sambært Cunard Line hevur „Queen Elizabeth 2“ siglt 800 ferðir tvørtur um Atlantshavið, og 25 ferðir hevur skipið siglt runt um Jørðina.

### Valdu kvinnur

Fronsku kvinnurnar hava ongantíð verið so væl umboðaðar í tjóðartinginum í París sum aftan á seina valumfar um vikuskiftið. Undan valinum sótu 76 kvinnur í tinginum, men nú eru tær 106 í tali. Av teimum umboða 60 flokkarnar á vinstravonginum, og 46 eru úr flokkunum høgrumegin miðjuna. Eftir franskari lóg hava flokkarnir skyldu til at hava líka nógvar kvinnur sum menn á uppstillingarlistunum, men teir sóru flokkarnir hava ilt við at halda lógina, hóast tað nú eru sjey ár, síðani hon kom í gildi.

### Í mesta lagi 10.000

Tað munnu vera tey fægstu, sum ferðast við 75.000 krónum í reiðum peningi uppi á sær, men tey, sum ætla sær út í Evropa at ferðast, eiga í hvussu er at hugsa um, at tað er ikki loyvt at hava meiri enn 10.000 evrur ella 74.480 krónur uppi á sær. Hevur tú meiri í reiðum peningi, skalt tú siga tollvaldinum á staðnum frá. Brot á ta regluna kann hava við sær, at tollvaldið leggur hald á pengarnar, og tað kann vera óheppið.